## Innbrotstjóvur leyslatin

Í gjár var tann seinni av innbrotstjóvunum, sum brutu inn í Føroya banka á Toftum herfyri, leyslatin. Hann varð varðhaldsfongslaður fram til 8. juni, tí hann noktaði seg sekan. Nú hevur hann tó broytt meining, hevur játtað seg sekan og slapp tí út. Hesin maðurin var saman við einum øðrum handtikin leygarnáttina 26. mai, tá teir royndu at ræna tvær pengaboksir. Hetta miseydnaðist sum kunnugt, og verða teir nú skuldsettir fyri vanligt innbrot.



## Sjómannadagur afturljóð í útnorði

Á Sjómannadegnum 17. august í fjør kastaðu børnini fløskupostar á Kalsoyarfirði . Hesir eru síðani funnir aftur av børnum í Føroyum, Íslandi og Noregi. Tað vóru Klakkur og Ågot, sum førdu tey umleið 100 børnini við fløskupostum út á fjørðin, har børnini skrivaðu á ein lepa hvar posturin var sleptur, og hvar eitt møguligt svar skuldi sendast til. Fyrstu fløskupostarnir vórðu funnir aftur á Vágoynni 20. august 2006 og síðani eru teir funnir víða um í útnorði. Á heimasíðuni hjá Norðlýsinum sæst kort yvir, hvar postarnir eru funnir og myndir av børnunum, sum hava fingið svar.

# Dolphin legði alt ov nógv fyri

**Mátararnir á spølunum vístu næstan tvær ferðir so nógv, sum skipið var egnað til. Løtu seinni holvdist tað**

VANLUKKA

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*„Bourbon Dolphin" fleyt í fleiri dagar, áðrenn tað sakk. Tosað hevur verið um at taka vrakið uppaftur.*

Sambært skipspappírunum mátti „Bourbon Dolphin" ikki átaka sær uppgávur, sum kravdu meiri enn í mesta lagi 180 tons sleipimegi. Kortini vístu mátararnir á spølunum 330 tons, beint áðrenn skipið holvdist millum Føroyar og Hetland tann 12. apríl. Vanlukkan kostaði átta mannalív.

„Bourbon Dolphin" lá hjá boripallinum „Transocean Rather" saman við trimum øðrum skipum. „Bourbon Dolphin" hevði ta minstu maskinorkuna av teimum fýra skipunum og skuldi tí hjálpa hinum, men av einari ella aðrari orsøk fekk skipið uppgávuna at flyta eitt akker hjá „Transocean Rather" tann 12. apríl.

Tann einasti av yvirmonnunum, sum slapp livandi frá vanlukkuni, hevur sambært blaðnum VG greitt frá, at teir bóðu hjálparskipið „Highland Valor" um hjálp, tá mátararnir nærkaðust teimum 180 tonsunum, sum skipið hevði loyvi til. Men hóast fleiri royndir miseydnaðist tað hinum skipinum at hjálpa við tí úrsliti, at øll tyngdin hekk á „Bourbon Dolphin". Undir sjófrágreiðingini skal yvirmaðurin hava sagt, at uppgávan fór at krevja millum 240 og 300 tons av spølunum, men at mátararnir vístu 330 tons, beint áðrenn skipið holvdist.

Tað var næstan tvær ferðir so nógv, sum „Bourbon Dolphin" var egnað til og hevði loyvi til, staðfestir VG.

### Nýggjar reglur

Sigurd Gude, virkandi stjóri í norska sjóferðslustýrinum, sigur við blaðið, at síðani vanlukkuna við „Bourbon Dolphin" hevur stýrið givið øllum frálandareiðaríunum boð um, at skipini skulu ikki átaka sær størri uppgávur, enn tey hava fingið loyvi til. Samstundis koma nýggjar reglur, sum gera mun á vanligum sleipi og arbeiði við ketum og akkerum.

# Eyka konsert við Eivør

**Atgongumerkjasølan til konsertina við Íslendska Symfoniorkestrinum og songkvinnunum Eivør Pálsdóttir og Ragnheiður Gröndal hevur gingið so mikið væl, at avgjørt er at hava eina eyka konsert fríggjakvøldið 15. juni**

TÍÐINDASKRIV

Undir heitinum “Minni úr farnari tíð” fara føroyska Eivør og íslendska Ragnheiður á pall at syngja saman við íslendska symfoniorkestrinum, sum til hesa konsertina telur ikki minni enn 80 mans. Sum heitið sipar til, eru kendir “slagarir” á skránni, sum Hrafnkell Orri Egilsson hegnisliga hevur útsett fyri symfoniorkestur. Fólk kunnu gleða seg til at hoyra nakrar av føroysku “slagarum” eisini.

Frásøgukvinna veðru Ragnheiður Ásta Pétursdóttir, sum í eitt mannaminni hevur verið ein elskað útvarpsrødd í Íslandi.

Norðurlandahúsið er karmur um stórfingnu tónleikavitjanina, og enn eru nøkur fá atgongumerkir eftir til fyrru konsertina hóskvøldið 14. juni. Nú er so eisini høvi at keypa atgongumerkir til eina eyka konsert fríggjakvøldið 15. juni. Báðar konsertirnar byrja kl. 19.30, og atgongumerkini á kr. 175,- eru at fáa í Norðurlandahúsinum ella á heimasíðu Norðurlandahúsins www.nlh.fo.

